# Kyndil móti silvurplássinum

**Eftir sigurin á VÍF skulu Kyndilskvinnurnar longu aftur í eldin týskvøldið, tá Stjørnan kemur á vitjan**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kyndil sýndi sunnudagin, at liðið hevur ítøkiligar ætlanir um at nærkast oddinum hetta kappingarárið, men hóast hetta úrslitið, er samlaða støðan higartil tann, at Kyndilsliðið hevur verið alt ov óstøðugt til veruliga at kunna hótta VB.

Hvørt hetta er ein sjúka, sum liðið er sloppið av við, fæst kanska at vita týskvøldið. Tá skal liðið nevnliga spæla ímóti Stjørnuni, sum somuleiðis hevur havt misjøvn úrslit. Einki er at ivast í, at á pappírinum er tað Kyndil, sum er favorittur, men spurningurin er so, hvørt hetta er nóg mikið, ella um liðið enn einaferð skal leggja rygg til eitt óvæntað tap. Eitt er so púra vist, og tað er, at tær á Stjørnuni standa til reiðar at taka av møguleikanum, um hesin brádliga hómast.

### Komandi dystur

12.11 18.30
Kyndil-Stjørnan

## Úrslit, meistaradeild kvinnur

| | |
|---|---|
| Fleyr-KÍF | 3-0 (25-22, 25-15, 28-26) |
| TB-Dráttur | 3-0 (25-11, 25-20, 25-21) |
| KÍF-ÍF | 1-3 (11-25, 15-25, 25-21, 5-25) |
| Fleyr-Mjølnir | 0-3 (11-25, 11-25, 11-25 |
| ÍF-Dráttur | 3-2 (25-11, 20-25, 25-18, 24-26, 15-6) |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 5 | 4 - 1 | 14 | 8 | 6 | 8 |
| 2 | TB | 4 | 3 - 1 | 11 | 4 | 7 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 4 | 3 - 1 | 10 | 5 | 5 | 6 |
| 4 | Dráttur | 4 | 2 - 2 | 8 | 9 | -1 | 4 |
| 5 | Fleyr | 5 | 1 - 4 | 4 | 12 | -8 | 2 |
| 6 | KÍF | 4 | 0 - 4 | 3 | 12 | -9 | 0 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 4 | 4 - 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 | Mjølnir | 3 | 2 - 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 3 | Fram | 4 | 2 - 2 | 7 | 6 | 1 | 4 |
| 4 | SÍ | 3 | 1 - 2 | 3 | 6 | -3 | 2 |
| 5 | Fleyr | 4 | 0 - 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |

# Tað stóð nógv á hjá ÍF



*Sum væntað vann ÍF báðar dystirnar um vikuskiftið, men tað var óvæntað at tær mistu sett móti KÍF, og móti Drátti vóru tær kroystar út í fimm sett, áðrenn sigurin var vísur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tó at úrslitini lagaðu seg so, sum tey flestu høvdu væntað, so var um reppið, at Dráttur skapti eina sensatión, tá tær á Kambsdali noyddu ÍF út í fimm sett**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Íroknað dystin millum Fleyr og KÍF týskvøldið, vórðu fimm dystir í meistaradeildini hjá kvinnum leiktir farnu vikuna. Einasta liðið, sum fekk fýra stig burturúr hesum, var ÍF, men tað skal so leggjast afturat, at tær høvdu tveir dystir hetta vikuskiftið.

Leygardagin leiktu tær í Hoyvíkarhøllini móti uppflytarunum úr KÍF. Dystin vunnu tær hampuliga trygt, men tað var tó eitt sindur óvæntað, at KÍF skuldi taka sær av triðja settinum, soleiðis at talan skuldi gerast um dyst á fýra sett.

Tað eydnaðist tó ÍF at vinna dystin, og tað gjørdi tað so eisini sunnudagin, men tað var kortini ikki meira enn akkurát. Alt tóktist annars ganga eftir vild, tá ÍF hevði tikið sær av fyrsta settinum, men brádliga mutaði Dráttur ímóti. Bæðí næsta og fjórða settið fór til vitjandi liðið, og so stóð á gomlum nøglum hjá ÍF. Í seinasta og avgerandi settinum megnaðu tær tó at reisa seg somikið, at sigurin ikki kom í veruligan vanda, og soleiðis halda tær framviegs fast um støðuna í oddinum, har tær nú eru tvey stig undan Mjølni og TB, sum tó hava leikt ein dyst færri.

### Fer at líkjast tvídysti

Umframt dystin á Kambsdali, so var Dráttur eisini í Trongisvági um vikuskiftið, men har var spenningurin so langt ífrá hin sami. TB var so ruddiliga við yvirlutan í dystinum, sum endaði við 3-0 sigri til heimaliðið.

Av Tvøroyri verður annars sagt, at tað var eingin ivi um, at TB var hitt betra liðið í dystinum. Nógvir óneyðugir vórðu gjørdir frá báðum pørtum, men hóast tað, so hevði TB tamarhald á, og tó at munurin í tølum ikki var so stórur í teimum báðum seinastu settunum, so var Dráttur ikki nær námind nøkrum, sum líktist spenningi. Soleiðis er líkt til,at TB framvegis heldur kósina, sum tær settu í fjør, tá liðið fyri fyrstu ferð gjørdist meistari.

Heldur ÍF á fram at sýna somikið óstøðug avrik, sum tær hava gjørt hesa vikuna, so er líkt til, at einasti veruligi avbjóðarin skal finnast í Klaksvík, og tær vóru í øllum førum ivaleysar, tá tær vitjaðu í Havnini. Ein tryggur 3-0 sigur uttan nakran sum helst slingur í valsinum varð úrslitið, og nú eru leikararnir helst av álvara farnar at hugsa um, hvussu tað man fara at ganga, tá liðið um tvær vikur skal royna seg á útivølli móti TB.

### Fleyr vann botnslagið

Umframt dystirnar um vikuskiftið, so varð eisini ein annars dystur leiktur í vikuni. Hesin varð týskvøldið millum botnliðini bæði, Fleyr og KÍF, og her eydnaðist Fleyr at fáa fyrstu stigini á árinum.

Talan var um tryggan sigur, sum greitt staðfesti, at hóast Fleyr ikki longur er tað, sum tær hava verið, so er framvegis munur til vinnaran av næst bestu deildini. Hinvegin hevur KÍF fleiri ferðir í ár havt hug at glepsa at mótstøðuni, og tó at tað ikki gekk hesaferð, so er einki at ivast í, at við royndunum fara úrslitini at betrast, og so er tað kanska als ikki so víst, at uppflytarin aftur í ár skal enda niðast.

# Gurið longu við aftur

**Átti fyri tveimum mánaðum síðani, men var longu at síggja á vøllinum aftur sunnudagin, tá VB vann á StÍF**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

At hondbóltsfepurin veruliga herjar í Vági, fekst besta prógvið um sunnudagin, tá VB vann sætta sigurin á rað og staðfesti sína støðu sum oddalið — enntá við tvær ferðir so nógvum stigum sum næstu liðini.

Tá fimm minuttir vóru eftir av dystinum, hoyrdist stórur fagnaður í høllini í Vági, tá 20 ára gamla Gurið Mortensen kom á vøllin.

At hon gjørdi tað, er í sær sjálvum kanska ikki so nógv at tosa um, tí tað hevur hon gjørt so mangan fyrr. Heldur eru tað umstøðurnar, ið gera hetta til eitt dømi um, at hondbóltsfepur herjar í Vági.

Tað eru ikki meira enn tveir mánaðir farnir, síðani Gurið átti ein lítlan beiggja tann 3. september. Hesin lítli hevur óivað eisini gott at bregða til í báðar ættir, tí pápin er fótbóltsspælarin Palli Augustinussen.

— Eg hevði vant tríggjar ferðir í vikuni, so eg fekk sjálvandi bara ta allarsíðstu løtuna í dystinum, sigur Gurið.

— Men tað var heilt ótrúligt at koma á vøllin og fáa so góða móttøku frá áskoðarunum. Og nú tað gongur so væl, er tað ordiliga stuttligt at vera við.

### En gleði at venja

Tvær vikur eru nú, til VB aftur skal spæla dyst, og Gurið sigur, at hon gleðir seg til at halda fram við venjingini.

— Tað er ikki gott at siga, nær eg klári ein heilan dyst aftur, men nú ætli eg mær at dríva á við venjingini, so tað kann verða skjótt, sigur hon.

— Eg gleði meg ordiliga at fara til venjing, og nú tað gongur so væl, er hvør einasta venjing sum eitt spæl.

Sum so mangan fyrr, eru venjingarnar hjá VB-kvinnunum næstan blivnar ein familjuhending, tí aftrat sær til venjingarnar hevur Gurið mammuna Eyðbritt Krosslá og mostrarnar Mary Krosslá og Arnleyð Hjelm.

Og tá vit spyrja, hvussu tað er at fáa barnagentu, meðan venjingarnar eru, sigur Gurið, at tað stendur ikki á við tí.

Tað skuldi bara mangla!



KÍF-StÍF 26-30 (15-14):

# StÍF var stinnari

**Triðju ferð gekk tað ikki hjá KÍF, men leingi høvdu teir sera fast tak á strandingunum, sum ongan tíð veruliga fingu glið á kontraspælið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Sveinur Justinussen, sum her verður tikin í gjøgnumbrotsroynd, var ein av heilt stóru profilunum sunnudagin, og yvirhøvur tykist unga stjørnuskotið í ár stevna móti sínum heilt stóra gjøgnumbroti í føroyskum manshondbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast talan á pappírinum ikki var um tey bæði fremstu liðini í løtuni, so er einki at ivast í, at spenningurin var sera stórur undan dystinum millum KÍF, og StÍF í Hoyvíkarhøllini.

KÍF hevur havt góðan byrð seinastu dystirnar, har talan hevur verið um sigrar á Tjaldur og VÍF, og tað var eisini sjónligt á áskoðarafjøldini, at her var talan um tvey lið, sum í løtuni hava viðrák. Longu væl undan dystarbyrjan bar illa til at finna sær sitipláss í Hoyvíkarhøllini, so tey, sum komu rættstundis til dystin, máttu bara finna sær eitt standipláss.

### KÍF hevði takið

Og heimaáskoðararnir tóktust als ikki hava nakra orsøk at vera ónøgdir um lið teirra fyrstu minuttirnar. Meðan StÍF tóktist hava sera tungt við at koma ígongd, byrjaðu kollfirðingarnir frá fyrsta bríksli at bomba bóltarnar móti StÍF málinum, og tó at Marian Cirloganescu ofta er maður fyri at taka tað ómøguliga, so var tað ikki bara at siga tað, tá hjálpin frá verjuni var millum lítil og eingin.

Spakuliga komu strandingarnir tó á rætta lagið. Verjuparturin riggaði kanska ikki so væl, sum hann onkun tíð áður hevur gjørt, so skjótálopini vóru ikki so nógv í tali. Hinvegin hevur StÍF eisini aðrar streingir enn kviku kontra'ini at spæla uppá. Bóltførleikin hjá einstøku leikarunum er í nógvum førum somikið góður, at teir upp á fá sekund megna at spæla mótstøðuverjuna tunna, og tað var fyrst og fremst hesin eginleikin, sum fekk teir inn aftur í dystin seinasta partin av fyrra hálvleiki. Aftur hesum, so hevur StÍF eisini eitt ógvuliga breitt lið, har hóttaninar móti mótstøðuliðnum koma úr øllum ættum. Sveinur Justinussen man vera ein hin bjartasta stjørnan á føroyska hondbóltshimmalinum, og tá Artur, Alexandur, Costin og allir hinir so verað lagdir afturat, so er tað greitt, at hetta er ikki eitt lið, sum tú steðgar við einføldum metodum.

Tá var annars leingi líkt til, at KÍF – og serliga Damir Oros – høvdu takið á mótstøðuni. Eftir stóra rykkið fyrstu løtuna slapp StÍF nakað upp í part, men tað var næstan alla tíðina so, at eini tvey-trý mál vóru á muni. Heldur ikki tóktist tað hjálpa, at KÍF eina løtu varð rakt av eini dupultútvísing, men beint fyri steðgin fingu teir kortini togað seg uppaftur, soleiðis at munurin bert var hitt eina málið í steðginum.

### Tann lítli munurin

Mest sum alt fyri eitt eftir steðgin fingu áskoðararnir varhugan av, at her fór talan at gerast um 30 sera spennandi minuttir. Framvegis hevði Damir Oros sera gott sikti á kanónini, men hesaferð tóktust strandingar ikki ætla, at kollfirðingarnir skuldu sleppa undan teimum.

Eitt skifti var kanska líkt til, at strandingar veruliga skuldu missa takið. Leikferðin fór niður, og samstundis vóru nakrar tekniskar villu ar hóma, men kollfirðingarnir megnaðu tó ikki at gera sær dælt av hesum.

Og so hendi tað móti endanum, sum tað so ofta ger, tá oddalið spæla móti lægri støddum liðum. Tann lítli munurin millum toppin og so hini kom til sjóndar, tá StÍF seinastu tíggju minuttirnar sveiggjaði seg upp, soleiðise at teir fingu marginalararnar yvir á sína síðu. Eina lítla løtu høvdu teir hug at leggja mansverju yvir á Damir Oros, og eftir øllum at døma var hetta nóg mikið til í øllum førum at órógva spælið hjá KÍF. Marian tók sær nú av tí mesta, sum kollfirðingarnir tveittu eftir honum, og so kundi vandamikla kontraspælið koyra sína vanligu gongd. Tað gjørdi tað eisini somikið effektivt, at munurin seinastu fimm minuttirnar gjørdist fýra mál, sum soleiðis tryggjaðu StÍF sigurin í einum sera spennandi dysti.

### Árið er langt

Sigurin ber við sær, at strandingar framvegis eru við í avgjørda oddinum. VÍF hevur eins nógv stig sum strandingar, men vestmenningarnir hava leikt ein dyst fleiri, og tí gevur hetta í øllum førum á pappírinum eina betri støðu hjá strandingunum.

Hartil skal sigast,a tað higartil hevur sýnst, sum um strandingarnir veruliga meina tað í álvara í ár. Avrikini higartil hava verið nógv meira støðug, enn tey vanliga eru hjá liðnum, og tó at VÍF nú tykist koma í snúningar, so skal helst rættiliga nógv til, áðrenn strandingar fara niður at liggja.

Kollfirðingar megnaðu ikki hesa ferð at lyfta seg heilt nær oddinum, men teir fingu enn einaferð sýnt, at har eru veruliga knotur í liðnum. Tað kann væl vera, at teir longu nú hava mist ov nógv til at gera seg galdandi í grundspælinum, men fáa teir fínpussað spælið eitt sindur meira til endaspælið, so er ikki óhugsandi, at teir fara at gera enn meira um seg til ta tíð, enn teir longu hava gjørt.

### Dysturin í tølum

**KÍF-StÍF 26-30 (15-14(**
Málskjúttar:
KÍF: Damir Oros 13(2), Vagnur Johannesen 3(1), Mirko Milinkvic 2, Eddie H. Joensen 2, Rógvi Weihe 2, Petur Martin Poulsen 2, Hallur Hansen 1, Kristjan Madsen 1
StÍF: Sveinur Justinussen 8, Alexandur Johansen 6, Kristjan Petursson 5, Artur Johansen 5(2), Bent Djurhuus 3, Costin Dumitrescu 3(1)
Brotskøst: KÍF 3, StÍF 5
Útvísingar: KÍF 6, StÍF 4
Diskvalifikatión: StÍF 1(3X2 minuttir)
Dómarar úr Kyndli: Eyðun Samuelsen & Hannis Wardum. Hóast talan til tíðir var um ein ferðmiklan dyst, so høvdu dómararnir alla tíðina gott tak á, eins og teir ómakaðu sær nógv at hava samband við leikararnar.

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 6 | 6-0-0 | 147 | 120 | 27 | 12 |
| 2 | VÍF | 6 | 3-0-3 | 135 | 123 | 12 | 6 |
| 3 | Kyndil | 6 | 3-0-3 | 151 | 141 | 10 | 6 |
| 4 | StÍF | 6 | 3-0-3 | 147 | 152 | -5 | 6 |
| 5 | Neistin | 6 | 2-1-3 | 116 | 122 | -6 | 5 |
| 6 | Stjørnan | 5 | 1-1-3 | 96 | 105 | -9 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 1-0-4 | 102 | 131 | -29 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 7 | 5-0-2 | 223 | 175 | 48 | 10 |
| 2 | StÍF | 6 | 5-0-1 | 178 | 157 | 21 | 10 |
| 3 | Neistin | 6 | 4-0-2 | 168 | 150 | 18 | 8 |
| 4 | Kyndil | 6 | 4-0-2 | 177 | 165 | 12 | 8 |
| 5 | KÍF | 7 | 2-0-5 | 177 | 183 | -6 | 4 |
| 6 | H71 | 6 | 2-0-4 | 138 | 169 | -31 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 6 | 0-0-6 | 140 | 202 | -62 | 0 |